# ítróttur

Nr. 36 • mánadagur • 20. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Formansatkvøðan taldi einki

**Óli Holm skuldi hava 12 atkvøður ímóti sær, skuldi hann fella á aðalfundinum - tað hevði hann ikki, og tí er hann framvegis formaður**


FSF-VAL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


Tosið eftir formansvalið í FSF-húsinum leygardagin var nógv. Millum tað, sum ofta varð havt á munni var atkvøðan, sum Óli Holm at enda gav sær sjálvum. Fleiri vóru ónøgd við, at formaðurin á henda hátt hevur ein eyka møguleika, men í veruleikanum var henda »eyka« atkvøðan óneyðug.



*Tá 22. atkvøðan var lisin upp, visti formaðurin ikki, hvørt hann var keyptur ella seldur. Hann fekk tó høvi at staðfesta sín egna post. Men tann atkvøðan var í veruleikanum púrasta óneyðug*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

### Meirilluti skal fella

Grein 7 í reglunum hjá FSF staðfestir nevnliga, at skuldi Birgir Enghamar verið valdur til formann, so »skal meira enn helmingurin av teimum møttu, sum hava atkvøðurætt, atkvøða fyri.«

Tí er næsta reglan í somu grein » Stendur á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi« bara galdandi, tá talan er um tvey nýggj uppskot. Tað vil siga, at var sama javnstøða galdandi fyri teimum árum síðani, tá tvey valevni dystaðust um sessin, sum stóð leysur eftir Dánjal Andreasen, so var tað tá follið Dánjali í lut at peika á avlosyara sín. Er talan um javnstøðu, og annað av evnunum er sitandi limurin, so ber tað ikki til matematiskt, at tað stendur á jøvnum, samstundis sum ein meiriluti er fyri nýggja evninum.

Tað er eisini ein av grundreglunum í modernaðum demokrati'i, at fyri at fremja eina broyting, so krevst, at ein meiriluti av møttu atkvøðunum er fyri at fremja broytingina. Eitt ímyndað dømi kundi verið, um t.d. FSF-nevndin hevði atkvøtt blankt á aðalfundinum. Tá kundi støðan verið, at Birgir Enghamar hevði 11 atkvøður, meðan Óli Holm hevði havt 10 atkvøður. Tá vildi Birgir havt fleiri atkvøður enn sitandi formaðurin. Men formaðurin vildi framvegis ikki havt ein parlamentariskan meiriluta ímóti sær. Og tí vildi hann ikki follið.

Talan er í so máta um eina beinleiðis paralell til stjórnarskipanarreglur, sum staðfesta rættindini til minnilutastýri, og tey í sjálvum sær hava jú ofta havt sera hepnar fylgjur fyri fólkaræðið. Ikki minst, tí meirilutin tá eisini í størri mun má lurta eftir tí, sum minnilutin førir fram.

### Eitt fordømi innan ÍSF

Tað er bara komið fyri einaferð, at reglan um avgerandi formansatkvøðuna er tikin í nýtslu innan ÍSF.

Hetta var, tá nýggjur skrivari skuldi veljast í felagsskapin í 1979. Lógarteksturin um formansatkvøðuna var júst samtyktur, tá atkvøðast skuldi um skrivaran. Tvey valevni høvdu tá fingið eins nógvar atkvøður, og tí mátti nýggja reglan takast í nýtslu mest sum alt fyri eitt.

Til stuttleikar kann nevnast, at ÍSF-formaðurin ta ferðina var Jógvan Arge, sum leygardagin var orðstýrari hjá FSF. Skrivarin, sum hann tá setti í sessin, var Heðin Mortensen, sum stutt eftir hetta gjørdist ÍSF-forseti. Ein sessur, sum hann hevur røkt síðan. Og sum eyka krúlla kann nevnast, at teir báðir í dag sita á teimum báðum hægstu sessunum í Tórshavnar Kommunu. Tó at tað nú er Heðin, sum er omanfyri Jógvan í hierarki'num.

# Formansvalið stendur við

**– Mítt mál hevur ongan tíð verið at syndrað felagsskapin, sigur Birgir Enghamar, sum ikki vil hoyra nakað tos um møguliga nýtt valumfar á eykaaðalfundi**


FORMANSVALIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


Var tað rætt, at onnur atkvøðan hjá EB/Streyumi varð ógyldag? Er tað rættvíst, at FSF-nevndin sjálv hevur eina avgerandi atkvøðu, tá ein meiriluti av feløgunum hevur eina aðra áskoðan? Og hví skal atkvøðan hjá formanninum kunna teljast tvær ferðir?

Hetta vóru nakrir av spurningunum, sum vórðu reistir í krókunum, tá menn eftir FSF-aðalfundin skuldu fyrihalda seg til útfallið av formansvalinum.

### Møguligt nýval

Seinasti spurningurin – um formansatkvøðuna – verður svaraður aðra staðni á hesum síðum sum órelevantur. Men teir báðir fyrst nevndu kunnu væl verða nakað, sum fleiri persónar hava hug at ilskast um.

Longu leygarkvøldið hoyrdust menn innan føroyskan fótbólt eisini tosa um møguleikan at seta formansvalið á skránna, tá eykaaðalfundur verður á skránni – í seinasta lagi tann 31. mars í ár.

Reglurnar hjá FSF innihalda ikki nakrar greiðar reglur fyri, hvussu formansvalið kann ganga umaftur. Men tað er tó staðfest, at mál kunnu takast upp á eykaaðalfundi, um 2/3 av møttu atkvøðunum taka undir við hesum. So møguleikin kundi í øllum førum staðið sína roynd.

### Vil ikki skapa split

Men sambært Birgiri Enghamar, so verður ikki talan um nakað nýtt valstríð.

Hann viðgongur, at tosað hevur verið um hetta. Og hann sigur seg eisini hava fingið beinleiðis fyrispurning um møguleikan. Ein møguleika, sum hann tó avgjørt hevur takkað nei til.

– Mítt mál hevur ongan tíð verið at syndra felagsskapin innan FSF. Sjálvandi eru nøkur mál, sum eg havi sagt mína hugsan um. Og eg haldi eisini, at hetta hevur gjørt mun. Í øllum førum átti tað at skapt nakað av eftirtanka, at feløgini í veruleikanum ynsktu leiðsluskifti í FSF. Tekur tú atkvøðuna hjá FSF-nevndini frá, so peikaðu 11 av 21 atkvøðum á meg. Tað vísir, at stórur partur av feløgunum tekur undir við teimum sjónarmiðjum, sum eg havi ført fram. Og skalt tú meta eftir formansfrágreiðingini, so eru fleiri av hesum punktum eisini tikin til eftirtektar.

– Og verða tey tað, so haldi eg avgjørt ikki, at eg havi stillað upp til fánýtis. Heldur hava vit umvegis fólkaræðið skapt bent hugburðin til ávísar lutir á rættari kós. Og vitanin um tað haldi eg hevur størri týdning, enn at gera enn eina roynd at koppa formanninum. Ein roynd, sum eg haldi bara kundi skapt split og ósemjur millum feløg, tí tað er ikki nakað, sum vit hava tørv á, sigur Birgir Enghamar.



*Hóast hann var nær við, so hevur Birgir Enghamar ongar ætlanir um ikki at virða úrslitið leygardagin. Hann heldur, at tað kann bara skapa split, um arbeiðast skal fyri enn einum valumfari*

*Mynd: Álvur*